# Leita eftir føroyskum sjómanni

**Løgreglan í Hanstholm leitar eftir einum 39 ára gomlum føroyskum sjómanni, sum ikki er sæddur síðani 4. novembur. Stutt fyri døgurða í dag fann løgreglan ein bil á havsins botni inni í havnini í Hanstholm, og seinnapartin skuldi bilurin takast upp fyri at vita, um nakar er í honum**

EFTIRLÝSTUR SJÓMAÐUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tá ið vit fyrrapartin høvdu samband við løgregluna í Thisted, sum er høvuðsskrivstovan hjá løgregluni í Hanstholm, høvdu teir júst funnið bilin á havsins botni.




*Bryggjan í Hanstholm er stongd av, har sum ein bilur í morgun bleiv funnin á havsins botni. Seinnapartin í dag skuldi bilurin togast upp á turt, og tá skuldi greiða fáast á, um nakar var í bilinum.*
*Mynd: Karsten Jensen*

**Nær við bátin hjá manninum**

Vakthavandi á politistøðini í Thisted sigur, at ongin hevur hoyrt frá føroyska sjómanninum og ein normanni, ið hann fylgdist við, síðani seint á kvøldi tann 4. novembur, tá ið teir vóru á einum vertshúsi í Hanstholm.

- Tað er ikki óvanligt, at ongin hoyrir frá sjófólki í eina tíð, men familjan hjá føroyska sjómanninum og normanninum eru stúrin, tí teir plaga at hava samband við familjuni við jøvnum millumbili, sigur vakthavandi.

Hann greiðir frá, at mikudagin var farið undir at leita í havnini í Hanstholm, og teir hava nýtt eitt slag av einum minibili, sum skannar havbotnin.

- Hetta er ein stór havn, so tað tekur eitt sindur av tíð. Men fyri løtu síðani funnu vit ein bil, sum liggur á botninum, beint við, har báturin hjá føroyska sjómanninum liggur. Bilurin hjá føroyska sjómanninum hevur eisini verið horvin síðani 4. novembur. Seinni í dag fara menn at fáa bilin upp á turt, og tá kunnu vit staðfesta, um nakar er í bilinum, sigur vakthavandi hjá løgregluni í Thisted.

Føroyski sjómaðurin, ið er eftirlýstur, hevur bústað á Bornholm, men báturin, ið hann siglir við, liggur sum áðurnevnt við bryggju í Hanstholm. Vit fara eisini at fylgja við gongdini í Hanstholm á portalinum.

# Nú er grundin burtur

**Í mong ár hevur ein grund staðið við endan av vegnum Oman Mattalág í vesturbýnum í Havn beint við síðuna av gamla stoypivirkinum. Grundin hevur leingi verið til ampa fyri grannalagið, og nú er hon so tikin niður**

NIÐURBRÓTING
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað er Húsalánsgrunnurin, ið eigur ognina. Jóannes Dalsgarð, stjóri á Húsalánsgrunninum, sigur, at tá ið grunnurin á sinni keypti ognina, vóru ítøkiligar ætlanir um at byggja íbúðir, men hesar steðgaðu upp, tí óvissa var um framtíðina hjá grunninum.

- Tað eru og hava verið røddir í løgtinginum, sum hava tosað nógv um framtíðina hjá grunninum, og um hann møguliga skuldi umskipast. Fyrr enn vit kenna okkum trygga við framtíðina hjá grunninum, fara vit ikki víðari við byggiætlanunu, sigur Jóannes Dalsgarð.




*Grundin, sum hevur staðið úti í Mattalág í nógv ár, er nú tikin niður. Húsalánsgrunnurin, sum eigur ognina, hevur enn ikki gjørt av, hvat skal gerast á økinum*
*Mynd: Jens Kristan Vang*

**Nógv plágað av ótangum**

Grundin hevur eins og tóma stoypivirkið við síðuna av verið nógv nýtt av ótangum, sum hava gjørt bæði líkt og ólíkt á ognini.

- Vit hava neglt fyri bæði stoypivirkið og á grundini óteljandi ferðir, men hvørja ferð eru ótangar komnir aftur og hava brotið alt upp aftur. Teir hava gjørt bæði líkt og ólíkt á ognini, og tað er ikki so langt síðani, at bál var kynt inni í stoypivirkinum, greiðir Jóannes Dalsgarð frá.

Stjórin í Húsalánsgrunnin greiðir frá, at økið eisini hevur verið nógv vitjað av børnum, sum hava spælt á ognini, og tað hevur ikki verið heilt vandaleyst. Bæði Húslánsgrunnurin og Tórshavnar Býráð hava fingið fleiri áheitanir um at gera okkurt við trupulleikan, tí tey eru bangin um børnini, sum spæla har, og fyrr í vikuni var so farið undir at bróta grundina niður.

- Vit hava latið grundina staðið, hóast hon ikki hevur verið hóskandi til ætlanirnar hjá okkum. Nú er hon so tikin niður, og so fáa vit at síggja, hvat verður gjørt á økinum, sum er umleið 5.000 fermetrar stórt. Sjálvandi hava vit nakrar tankar, men ikki nakað ið vit vilja út við enn, sigur Jóannes Dalsgarð.

## Gott til eldraíbúðir

**Borgarstjórin í Havn, Heðin Mortensen, hevur havt nógv samband við Húsalánsgrunnin um grundina úti í Mattalág, og hann fegnast um, at grundin nú er tikin niður.**

NIÐURBRÓTING
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

- Vit hava arbeitt við hesum í fleiri mánaðar, og tað hevur verið nógv samband við Húsalánsgrunnin. Tað er einki dulsmál, at grundin hevur staðið sum ein skomm í langa tíð, sigur Heðin Mortensen.

Borgarstjórin sigur, at hann hevur fingið óteljandi áheitanir frá fólki um at fáa grundina burtur, tí hon hevur verið til stóran vanda fyri børnini í grannalagnum.

- Tað er ótrúliga gleðiligt, at hon nú er tikin niður. Nú verður spennandi at síggja, hvat fer at henda við økinum, tí har eru nógvir møguleikar. Eg hevði ynskt mær, at tað til dømsi blivu gjørdar eldraíbúðir á økinum, tí tað liggur sera væl fyri og mitt í býnum, sigur Heðin Mortensen.